# Visti tú at:

- 4 av 10 kvinnum
- 1 av 10 monnum
- 6 av 10 børnum

**liva við harðskapi?**

- í miðal fara kvinnur 7 ferðir frá makanum, áðrenn tað eydnast at sleppa burturúr harðskapinum?
- fremjarin ofta vil sleppa við harðskapsrakta makanum til lækna, ljósmóður og aðrar viðtalur?
- børn, sum liva við harðskapi, eru líka hart rakt, sum vórðu tey sjálvi útsett fyri harðskapi?
- at hava livað í harðskapi í barndóminum kann viðvirka til, at mørkini, serliga í mun til harðskap, verða flutt?
- meira enn helvtin av teimum, sum gista á kreppumiðstøðum, eru útlendingar?
- harðskapurin í fyrstu syftu versnar, tá ein kvinna sigur frá?
- harðskapurin versnar longu mánaðir áðrenn fremjarin veit, at harðskapsrakt fara at søkja sær hjálp?
- børn, sum liva við harðskapi, kunnu fáa sálarligar trupulleikar, so sum angist, tunglyndi og etingarólag?
- harðskapsrakt, sum søkja sær hjálp, er í eini vandamiklari støðu?

# Visti tú at:

- harðskapsrakt viga fyrimunir og vansar við at søkja sær hjálp?
- harðskapsrakt í stóran mun hava tørv á, at tað verður lurtað eftir teimum?
- barnakonur og kvinnur sum nýliga hava átt, eru í øktum vanda fyri harðskapi?
- fyrstu ferð harðskapsrakt søkja sær hjálp, ivast tey um talan er um harðskap?
- harðskapsrakt, kvinnur og menn, sum eru tínir grannar, vinfólk, starvsfelagar og familja, í stóran mun eru til arbeiðis hvønn dag?
- harðskapur kann viðvirka til, at børn fara at fremja harðskap?
- hagtøl úr Danmark vísa, at árliga verða dripnar 12 kvinnur í parlagi ella nærsambondum?
- avvarðandi kunnu vera ein góður stuðul hjá harðskapsraktum, eitt nú við at lurta og vísa umsorgan?
- harðskapsrakt aftra seg við at søkja sær hjálp?
- við at tora at spyrja inn til harðskap, so er fyrsta fræið sátt til at sleppa burturúr harðskapinum?
- tað kann taka fleiri ár hjá harðskapsraktum at fara, eftir at tey hava tikið avgerðina?